## DAGSINS MEINING

# Myrk skýggj - vantandi loysnir

Ólavsøkurøðan hjá løgmanni staðfestir,

- at búskaparligi vøksturin er steðgaður,
- at stóri vøksturin bruttotjóðarúrtøkuni er avhæsaður,
- at eingin vøkstur er í útflutningi,
- at lutfalsliga størri partur av útflutninginum er óvirkaður fiskur,
- at lønarútgjaldingarnar í høvuðsvinnuni eru minkaður
- og at alivinnan er í stórari kreppu o.s.fr.

Hetta tyssi av minni ja-ligum staðfestingum vísir, at búskaparútlitini eru alt annað enn bjørt. Tí hevði tað verið upp á sítt pláss, at løgmaður brúkti ein størri part av meta um avleiðingarnar av verandi gongd, og koma við boðum ella uppskotum um, hvørji tiltøk skulu gerast fyri at byrgja fyri einum búskaparligum hóttafalli.

Tá fíggjarlógaruppskotið varð umrøtt um ársskiftið fekk almenningurin boð um, at útreiðslurnar á fíggjarlógini skulu skerjast eitt prosent. Um tað er nóg mikið til at forða fyri eini búskaparligari afturgongd, er ilt at siga, men fáar ítøkiligar sparingar eru nevndar í ólavsøkurøðuni hjá løgmanni. Tó verður lopið upp um, har garðurin er lágur: telefonfrádrátturin hjá langfarafiskimonnunum skal strikast!

Tað er einki at ivast í samfelagsinntøkan fer at lækka, nú rækju- og alivinnan eru í kreppu við teimum avleiðingum, at fólk missa arbeiði og at útflutningurin fer at minka. Men vinnan skal ikki stuðlast, heldur ikki við tíðaravmarkaðum kreppuloysnum, er landsstýrið samt um.

Harafturat er landsstýrið samt um, at sjálvstýristilgongdin skal halda fram. Tó skal tilgongdin nú verða meira ella minni eftir einum heimastýrisleisti, sum ein landsstýrismaðurin hjá Fólkaflokkinum mælti til fyri meira enn einum ári síðani!!!

Afturímóti verður neyvan lætt at finna semju um at orða trygdarpolitikk, so Føroya gerast meiri virknar á trygdarpolitiska økinum, sum løgmaður boðaði frá. Fólkaflokkurin vil hava eina nýggja samtykt ístaðin fyri gomlu hernaðarsamtyktirnar. Men tað kann Tjóðveldisflokkurin neyvan taka undir við, tí hernaðarmálið er ein partur av samleika Tjóðveldisflokksins.

Ífjør boðaði løgmaður frá, at aðalorðaskifti skuldi vera um trygdarpolitisku støðuna í vár, og tá skuldi ein nýggj samtykt gerast. Einki er tó hent enn. Men í ár skal tað verða, boðaði løgmaður frá, men hesum munnu mong ivast í, hóast tey óivað taka undir við orðum løgmans, at tað hevur alstóran týdning, at Føroyar hava eina felags støðu í hesum máli.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ískoyti til brennivínsspurnarkanningin og fyribrigdið »dupultmoralur«

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður*



**"Dupultmoralur" er ikki annað enn ómoralur, men hetta orðið, verður áhongt nøkur av okkum og merkir, at vit liva annað heima enn burtur, eru, simpul, hál og serstakliga óálítandi**

Tá blaðmaður Dimmalættingar, Uni L. Hansen, ringdi og setti tvinnar spurningar um ávíkavist framleiðslu og innflutning av rúsevni, segði eg, at her fer "dupultmoralur" at verða brúkt um okkum sum svara ja, fyri innflutningi og nei fyri framleiðslu.

"Dupultmoralur" er ikki annað enn ómoralur, Eitt "forfína" og nú útvatnað orð fyri ómorali, sum helst er komið upp undir eini ella aðrari veitslu, og verður áhongt ávís sløg av fólki, sum eru óálítandi, hál, simpul og liva eitt lív heima og annað burtur.

Vit sum eru komin nakað til árs, og sæð partar av avleiðingunum, sum brennivínið hevur havt, har tað í ómetaliga mongum førum er misnýtt, teir ræðuleikar hetta hevur elvt til fyri so mong hjúnaløg og tað mest syrgiliga, hvussu hetta hevur gjørt seg inn á verjuleys børn, oyðilagt lív teirra, høvdu ynskt, at hetta ongantíð kom til landið.

**Hvør avgerð grundarlagið fyri mómorali**

Tað er gott, at nøkur eru, sum eru afturhaldandi, og í øllum førum siga nei til framleiðslu her á landi, um ikki annað fyri at vísa, at vit mótmæla hesum drykki, sum hevur havt eina so syrgiliga oyðandi ávirkan á óteljandi familjur og oyðilagt lívið hjá børnum og ungum, sum vóru við at seta føturnar inn á - kanska - eina gylta lívsleið.

Leggjast skal tó afturat, at tey eru mong, sum duga at nýta hetta við tign.

Men at vit av bæði Javnaðar- og Sambandsblaðnum, løgtingsmonnunum Tórbirni Jacobsen og Kaj Leo Johannesen verða skýrd ómoralsk av hesum orsøkum, tað er ovboðið.

**Stórur samfelagskostnaður**

Nú Javnaðar- og Sambandsblaðið gera so nógv burtur úr hesum ómorali, kundi verið hóskandi at víst á allar teir hjálparstovnar sum stinga seg upp, og flestu teirra, verða fíggjaðir úr landskassanum. Hesum landskassa sum fyrst tekur hópin av peningi inn av rúsevnisnýtslu, og sum ger, at ótal av fólki forkemur bæði sær sjálvum og børnum teirra, fyri síðani at fíggja hesar stovnar av landkassavinninginum av brennivíni, og soleiðis bøta um tílíkar ógerðir.

Í kanning, sum fyri nøkrum árum síðani varð gjørd í Noregi, varð sagt, at fyri hvørja krónu ríkiskassin fekk inn í tolli, fór hálvonnur króna út í sjúkrahúskostnaði av rúsdrekkaávum. Her var ikki roknað við mistarari arbeiðstíð, við oyðiløgdum hjúna- og familjulívi og árini á børnini og fólki sum sosialt fullu burtur í millum.

**Skýrdur ómoralskur av ávísum politikara**

Ofta verður tikið til, at "danir duga betur at drekka enn Føroyingar". Ja, sum eg helt fyri einaferð í tinginum, "teir duga so mikið væl, at teir duga best". Fyri kortum var ein frágreiðing í fjølmiðlunum, at "danir drukku mest í Norðanlondum".

Ídag skriva bæði Javnaðar- og Sambandsblaðið ikki so sjáldan um "tann veika" í samfelagnum ella samfelagstaparan, og um at "ov lítil peningur verður settur av til at byggja upp, tað sum er oðyðilagt", av rúsevnismisnýtslu.

At oddagreinahøvundarnir – møguliga ávíkavist Jan Müller og Beata L. Samuelsen – í Javnaðar- og Sambandsblaðnum, skulu skýra meg ómoralskan, er kanska ikki annað enn væntandi, men at maður sum Tórbjørn Jacobsen, skal skýra meg ómoralskan, og at hann skal "punktera allan dupultmoral", finni eg meg ikki í!!

# Málið um Jógvan S

**Magnus Pauli Lassen**



Hetta man vera eindømi um lygn og korruptión av grovasta slag! Tað er neyvan nakar, ið varar av fiskivinnuni í dag, sum ikki veit, at Ågot varð latin til Noregs fyri nýggja Ågot.

So langt, so gott og nú er skipið undir norskum flaggi og tíverri fyri Jógvan Lutzen,at skal tað skrásetast aftur í Føroyum, má tað skrátast eftir nýggju lógini, men tað er ikki hent.

Tí er skipið Ågot ella Jógvan S framvegis norskt.

Og nú hóttanir um endurgjaldskrav eru settar fram, verður fiskiloyvið tikið aftur, má spyrjast, hvatskal úr flotanum fyri Jógvan S.?

Skørðin fór úr flotanum sum línubátur fyri Grana, men hon varð seld aftur til Nólsoyar og síðani keypti Jógvan I Olsen hana aftur til at fiska eftir hávi við. Hon var bara tveir túrar, so var Skørin undir Íslandi og fiskaði av kvotuni hjá línubátunum og hon kom eisini undir Føroyar at fiska innan fyri 6 og 12 fjórðinga markið sum útróðrarbátur.

Tað ganga so nøkur ár við hesum fiskiskapi, So nú skal Stapin skiftast út og Skørin og Stapin mugu leggjat fyri at fáa nýggja Stapan heim úr Noregi.

So nú koma vit aftur til Ågot og Jógvan S. Og nú skal Skørin aftur úr Flotanum!

Sig mær nú: Hvat verður næsta skipið, sum fer til fiskiskap undir Føroyum fyri Skørina?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

Rættarpolitikkurin:

# Jógvan S og eygleiðarin

**Óli Jacobsen**



**Enn eina staðfest, at kravið um at "lóg er lóg og lóg skal haldast" valdast hvønn og hvat málið snýr seg um.**

Søgan um "Jógvan S" lýsir so væl sum nakað politisku skipanina í Føroyum. Eitt áhugavert í hesum máli er, at tjóðveldisflokkurin hevur í "Fregnir" fleiri ferður lagt fólkaflokkin undir korruptión, uttan at fólkaflokkurin hevur so frægt sum roynt at vísa hesum aftur!

Mannagongdin má eisini sigast at vera merkisverd, tá hugsað verður um tær royndir, sum vit onnur hava av avgreiðsluni í fiskimálaráðnum, sum komið verður til seinni í greinini. Tá talan er um fólkaflokksáhugamál og beint uppundir val kann eitt so torgreitt mál verða avgreitt eftir einum gerandisdegi.

Í hesum døgum sleppur tjóðveldisflokkurin at føra seg fram sum teir stóru rættvísisapostlarnir í hesum máli við sínum kravi um, at fiskiloyvið hjá "Jógvan S" skal takast aftur, grundað á niðurstøðu hjá landsstýrismálanevndina.

Her til skal fyrst sigast, at søgan prógvar als ikki, at landsstýrismálanevndin umboðar nakra hægri rættvísi. Hetta hevur verið prógvað væl og virðiliga í FF-blaðnum. Heldur er nevndin vorðin ein politisk amboð hjá parti av samgonguni móti øðrum parti í einum ping pong spæli at jarðleggja hvønn annan.

**Hvør skal svíða fyri ólógliga umsiting?**

Men hetta reisir eisini aðrar spurningar. Ein er hvør skal svíða fyri eini evt. ólógliga umsiting? Skal tað vera tann, sum hevur gjørt seg sekan í lógarbroti, ella skal tað vera tann borgarin, sum hevur fingið eina tilsøgn frá almennum myndugleika, sum eftir øllum umsitingarreglum er bindandi?

Og hvussu við tí myndugleika, løgmanni, sum hevur eftirlitsskyldu við, at landsstýrismenn røkja sítt starv á fullgóðan hátt? Og hvør skal gjalda tað endurgjald, sum sjálvt framsøgumaðurin hjá tjóðveldisflokkinum viðurkennir skal gjaldast við afturtøku av fiskiloyvinum hjá Jógvan S?

**Lóg er lóg, men lóg skal (opinbart) valdast!**

Í einum rættarsamfelagið er tað ein høvuðsregla, at øll skulu vera líka fyri lógini. Hetta má eisini innibera at politiska skipanin, sum t.d. løgtingið skal viðgera øll politisk framd lógarbrot eins. Um hetta ikki verður gjørt kann ivi vera um, hvørt tað veruliga er rættvísiskensla sum liggur aftanfyri.

Síðan verandi samgonga tók við í 1998 er hent tað, at alt sum eitur fyrisitingarlóg er sett úr gildi. Hetta merkja fiskimenn og teirra felag dag og dagliga. Henda gongd er grundað á beinleiðis lógarbrot hjá Anfinn Kallsberg, sum hann framdi sum bráfengis landsstýrismaður í fiskivinnumálum í 1998, og ta í eini støðu, tá hann skuldi havt annað at hugsa um.

Men hetta lógarbrot varð bakkað upp av tinginum, og eisini av tjóððveldisflokkinum. Júst henda tingsins góðkenning av, at landsstýrismaður ikki nýttist at fylgja eini løgtingslóg, hevur lagt grundarlagið fyri ta longu røð av ivasamari umsiting í fiskimálaráðnum síðan tá, um bert gingið skal vera út frá landsstýrismálanevndini.

Vit hava tær somu royndir, tá talan er um málsviðgerð av málum viðvíkjandi fiskimonnum. Hesi eru sera væl lýst í FF-blaðnum. Men landsstýrismálanevndin hevur als ikki havt áhuga fyri tilætlaðum brotum á lógum viðvíkjandi rættindi hjá fiskimonnum. Tað hon hevur gjørt er at legaliserað slík brot. Tað í sær sjálvum setir spurnaðartekin við hesa nevnd.

**Eitt dømi er nóg mikið: Eygleiðaramálið.**

Tað er nóg mikið at lýsa bert eitt mál, eygleiðaramálið, sum saman við Jógvan S málinum lýsir rættarstøðuna í Føroyum betri enn nakað annað.

Í eygleiðaramálinum var gongdin í stuttum henda:

Fiskimaður við rækjuskipi ger fiskimálaráðnum tann beina at mynstra sum eygleiðari. Eftir ávísing hagani verður mynstrað á einum serligum teigi í mynstringarlistanum. Tá maðurin gerst sjúkur verður **júst hetta** nýtt sum grundgeving fyri at nokta honum sjúkraviðbót. Hetta er í sær sjálvum ein "góð" og ræðandi lýsing av hugburðinum í politiskt/umsitingarligu skipanini móti teimum borgarum, sum hon skal eitast at tæna!

Hjá FF hevur tað ongantíð verið nakar sum helst ivi um, at tað var ein fullkomiliga greið heimild í lógini fyri at gjalda sjúkraviðbót. Hetta mál endaði í rættinum, har FF fekk viðhald. Men tað sum er fullkomiliga lýsir rættarfatanin í politisku skipanini er sjálv "viðgerðin" av málinum í fiskimálaráðnum, har Jørgen Niclasen hevði beinleiðis ábyrgdina.

**Eingin løgfrøðislig viðgerð.**

Og her kann staðfestast:

1. Fyri tað fyrsta fekk borgarin ongantíð nakra grundgeving fyri, at hann ikki kundi fáa sjúkraviðbót, og er hetta einsamalt beinleiðis brot á fyrisitingarlógina.

2. Men undir sakini kom eisini fram, at málið hevði **ongantíð** fingið nakra málsviðgerð og at eingin løgfrøðingur hevði nakrantíð mett um málið. Hevði tað verið gjørt hevði tað ongantíð gjørst nakar trupulleiki hjá borgaranum, tí løgfrøðisliga var málið fullkomiliga greitt.

3. Hvussu lítið fiskimálaráðið hevði um at halda, varð eisini greitt undir sjálvari dómsviðgerðini. Teir høvdu **einki** skjal at leggja fram sum stuðlaði teirra sak, og teir góvu heldur **ikki** frágreiðing í rættinum sum kundi útgreina teirra sjónarmið. Hetta prógvar í sær sjálvum, at her var eingin saklig grund fyri umrøddu mannagongd.

**Hvussu kávað verður yvir - summi - lógarbrot.**

Eitt ár eftir at málið byrjar leggur Jørgen Niclasen nú uppskot fyri tingið um at geva heimild at geva eygleiðarum sjúkraviðbót. Fekst tingið at avgreiða málið áðrenn viðgerðina í rættinum, slapp hann undan at fáa staðfest, hvussu hann enn einaferð hevur framt lógarbrot. Hetta uppskot varð fyrst lagt fyri fiskivinnuráðið, sum var samt um, at hetta uppskot var ikki neyðugt, tí heimildin var longu til staðar í tá verandi lóg! Men hóast hesa greiðu staðfesting, sum kundi verið sakligt grundarlag fyri at avgreiða málið, leggur Jørgen av umrøddu orsøk málið fram á ting.

Nú er Jørgen komin í tingið aftur, og hann leikar í at fáa umrødda lógaruppskot samtykt í tinginum, áðrenn sakin kemur fyri rættin, so tað ikki skal verða staðfest, hvussu hann hevur farið við fiskimanni í egnari tænastu.

**Hvør er nú í parti við Jørgen: Tjóðveldisflokkurin!**

Og hvør stendur nú við hansara lið í royndunum at káva útyvir greitt og tilætlað lógarbrot? Jú, tann í dag í Jógvan S málinum sjálvrættvísi tjóðveldisflokkurin!

Hóast umrøddu royndir endaði hetta við, at dómurin fall og gav FF fult viðhald áðrenn tingmálið hjá Jørgen varð endaliga avgreitt í tinginum. Hetta skuldi so náttúrliga ført til, at tingmálið fall burtur, tí tað ikki longur var aktuelt. Ikki minst skuldi hetta verið gjørt, tí tað kundi staðfestast, at Jørgen við framløguni av lógaruppskotinum beinleiðs hevði villeitt tingið við sínum grundgevingum og viðmerkingum fyri at leggja málið fram! Nevniliga at tað ikki var lógarheimild fyri at geva sjúkraviðbót. Hetta fortelur hann tinginum uttan at nøkur løgfrøði stóð aftanfyri.

**Føroya Løgting letur seg brúka.**

Men hvat ger tingið? Tað ger seg enn einaferð fullkomiliga til láturs við at samtykkja eina lóg sum longu er í gildi við tí endamáli at halda hondina yvir lógarbrot hjá Jørgen Niclasen (og Anfinn Kallsberg sum fyriskipara og sum hann ið eftirlitsskyldu við landsstýrismonnum).

Hevði løgtingið so av illum nýtt tikið spurningin um viðgerðina av hesum máli upp og álagt avvarðandi landsstýrismonnum við umsitingum at fáa skipaða málsviðgerð í framtíðar málum, so slíkt ikki kundi henda aftur, so kundi nakað verið gjørt við ta grundleggjandi orsøkina til, at ein slík umsiting í heila tikið kundi finnað stað.

Men hetta hevur púra ongan áhuga. Og tað kann longu staðfestast, at "viðgerðin" hjá tinginum av hesum máli verður náttúrliga av umsitingini tikið sum eina góðkenning av, hvussu henda málsviðgerð er farin fram. Og tí eru endurtøkur longu á veg.

**Føroyski borgarin rættarleysur.**

Hetta mál vísir púra greitt, at borgarin í Føroyum er púra rættarleysur. Tí hetta mál er als ikki nakað eindømi. Men tað eru uttan iva í nógvum øðrum førum, at borgarin ikki er so heppin sum í hesum máli, at hann hevur ein til at føra sína sak. Í slíkum førum kemur borgarin ikki at fáa sín rætt. Og politiska viðgerðin av hesum máli er eitt greitt signal til umsitingina um, at hon skal bara gera sum hon plagar og sum tað hóvar henni.

Hetta mál vísir eisini enn einaferð, at rættur fyri lógini valdast hvør tú ert. Er tú ikki í krithúsinum hjá teimum ráðandi hevur tú ongan kjans. Og hetta lata teir ráðandi ganga útyvir meinigar borgarar. Hetta er almenni rættarpolitikkurin í Føroyum.

**Eingin andstøða.**

Tað má kennast løgið, tá ein sær hvussu stjórnir í einaræðislondum mugu enntá nýta stóra orku til at niðurberja andstøður, sum enntá seta lívið í vága fyri at kunna verja fólkaræði og mannarættindi, at síggja hvussu vit í Føroyum hava eina andstøðu, sum fullkomiliga er farin í "sjálvbodna likvidatión", og sum er so steindeyð sum um hon var gassað í sjónleikarhúsinum í Moskva.

Nú hevur ein kunnað sæð rættarbrot eftir rættarbrot á ymiskum økjum, uttan at "andstøðan", sum vera skal, hevur klovið í tvey. Ein hevði kanska kunnað vænta, at javnaðarflokkurin fór at gera bart, tá teir síggja hvussu vanligir borgarar verða viðfarnir. Men hesin einaferð so stolti flokkur við sínum einaferð óræddа blað eru vorðin so "konfliktsky" at fremsta endamálið er, at verandi samgonga skal ikki trakkast á tærnar. So heldur lata eyguni aftur fyri slík uppløgd og tilætlað rættarbrot, sum her er talan um.

Tað kann í hvussu er staðfestast at hesir báðir flokkar í andstøðu eru í hvussu er ikki alternativ til nakað sum helst.

Hetta er tann rættarstøða sum Lisbeth Petersen, Høgni Hoydal, Jóannes Eidesgaard, Anfinn Kallsberg, Jenis av Rana og Kári Højgaard hava at bjóða føroyska borgaranum.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!